Eitt serligt punktum

Hann er fjórða ættarlið, sum hevur rikið siglingina um Vestmannasund, og tí var tað ein heilt serlig løta, tá hann sigldi tann síðsta túrin um sundið. Nú gongur leiðin um Leirvíksfjørð, har næsti undirsjóvartunnilin skal gerast

SÍÐSTI TÚRUR
Ingi Rasmussen

»Eg eri ikki vanur við annað.«

Karmal Olsen stendur á brúnni umborð á Ternuni og hyggur yvir móti vágalandinum og Oyrargjógv, hagar hann stýrir ferjuna fyri síðsta ferð.

Eitt kapittul í føroyskari samferðslusøgu endar, og eitt annað byrjar hendan týsdagin 10. desember 2002. Vágatunnilin letur upp, og sjóvegis farleiðin um sundið er søga.

Harvið er eisini síðsta punktum sett í søguni um vestmannafamiljuna Olsen og ferjusiglinginga um Vestmannasund. Karmal er fjórða ættarlið, sum siglir millum Streymoy og Vágar. Langabbin, abbin og pápin og øll systkini, eisini systirin, hava siglt her.

– Eg havi siglt her, síðan eg var smádrongur, so hetta er sjálvandi eitt heilt serligt upplivilsi fyri meg. Familjan hevur nøkur serlig bond til Vestmannasund, men vit eru líka glað sum øll onnur fyri Vágatunnilin, og tí er hetta ein góð hending. Vit hava vant okkum við, at tað nú er liðugt, men sjálvandi er hetta ein øðrvísi túrur, sigur Karmal.

Hann hyggur út á sjógvin mest sum alla tíðina. Tað er líkasum vil hann drekka sær eyguni full, meðan hann kann.

Pápin, sum var elst av seks systkjum, var bara 18 ár, tá hann yvirtók rutuna eftir abban. Onkur syrgilig hending fylgir eisini við. Pápabeiggin doyði í ferjutænastuni í 1958, tá ein bátur koppaði við lendingina, og Karmal er uppkallaður eftir honum.

Meðan vit tosa, verða vit brotnir av alla tíðina. Løgmaður og landsstýrismenn koma at taka í hondina, og Jóannes Eidesgaard, sum hevur verið óteljandi ferðir umborð, tá hann hevur verið í fólkatingsørindum, takkar fyri mangan góðan túrin.

– Babba, sigur ein lítil drongur, sum hálar í buksubrókina á Karmali. Sonur Karmal eitur Kim og er fimta ættarliðið, sum er við um Sundið. Hann fer so ikki at sigla um Vestmannasund, tá hann verður vaksin, eins og fýra ættarfaðir undan honum hava gjørt.

Spurningurin er so, hvagar Karmal fer, nú hansara heimasjógvur verður lagdur fyri sigling.

– Vit skulu allir sigla um Leirvíksfjørð, sigur hann og smílist eitt sindur við tankan.

Næsta fasta sambandið í Føroyum verður um Leirvíksfjørð, og tí er ikki óhugsandi, at sama søgan endurtekur seg, so Karmal og hinir mugu finna nýggjar farleiðir.

– Tá hava vit so roynt tað einaferð fyrr, men tað er eitt upplivilsi, sum eg gjarna vil fáa aftur, sigur Karmal.

Nýggjur marknaður fyri hýruvognarnar

Við fasta sambandinum verður tað munandi bíligari at leiga sær ein hýruvogn, eitt nú á flogvøllin. Bæði hjá Auto og Bil vænta tey sær fleiri túrar vestur í Vágar

FAST SAMBAND
Jón Brian Hvidtfeldt

Úti í heimi eru flogvøllir vanliga eitt gott mið hjá einum hýruvognsførara. Og nú Vágar er vorðin partur av meginøkinum, vænta eisini føroysku hýruvognsstøðurnar fleiri túrar við ferðafólki til og frá flogvøllinum.

Fasta sambandið ger tað nevniliga munandi bíligari at leiga sær ein hýruvogn, t.d. úr Havn vestur á flogvøllin ella hinvegin. Ein hýruvognur úr Havn á flogvøllin kostar vanligar dagar 526 krónur umframt tunnilsgjaldið, um kvøldið er kostnaðurin 611 krónur meðan túrurin kostar 687 krónur um náttina. Vikuskiftini er prísurin 661 krónur um dagin, og 687 krónur um kvøldið og náttina.

Til samanberingar hevur ein túrur við hýruvogni higartil kostað 1038 krónur um dagin og 1163 krónur um kvøldið. Vikuskiftini hevur tað kostað 1163 krónur um dagin og 1299 krónur um kvøldið. Harumframt kemur so billettin til Strandferðsluna, ið er 30 krónur fyri fólkið.

Bæði hjá Auto og Bil vænta tey sær fleiri túrar vestur í Vágar, nú fasta sambandið er veruleiki. Á báðum støðum hava hýruvognsførarirnir eisini tosað um at fáa sær sonevnda kubban í bilin, tí so gerst túrurin undir Sundið væl bíligari.

Hann takkaði í eystur og vestur, nú tunnilin um Vestmannasund lat upp. Helst takkar hann eisini fyri seg sum formaður fyri Vágatunnilin, nú verkætlanin er liðug. Hann sigur seg hava harða húð, men viðgongur í somu vending, at tað hevur staðið á sær persónliga

VÁGATUNNILIN
Ingi Rasmussen

Tá tú stendur í fremstu rað, so verður tú ikki spardur.

Soleiðis sigur Klæmint Weihe, nú Vágatunnilin loksins stendur koyribúgvin. Hann hevur sum formaður í nevndini fyri Vágatunnilin havt høvuðsábyrgdina fyri stóru verkætlanini at sprongja føroyingum farleið undir Vestmannasund. Hann hevur eisini verið ein nógv umrøddur persónur í sambandi við tunnilsarbeiðið, og eitt nú hevur spurnartekn verið sett við hansara gegni, tí hann eisini er stjóri í SEV.

Illa viðfarin

Tað hevur staðið nógv á persónliga, viðgongur Klæmint Weihe.

– Eg haldi, at mín persónur hevur verið nokk so illa viðfarin. Men eg havi harða húð, so tað skal eg nokk klára. Tá tú torir at taka stórar uppgávur á teg, mást tú eisini tola eitt sindur, men eg havi stundum saknað sakligheit, tá mín persónur er viðgjørdur alment, sigur Klæmint Weihe við Sosialin.

Ákoyringarnar førdu til stríð innanhýsis í SEV, og alt endaði við, at Klæmint Weihe mátti víkja sessin í næstu stóru verkætlanini undir sjónum, Norðoyatunlinum.

Sosialurin skilir, at ein partur av semjuni millum stjóran, stýrið og umboðsráðið í SEV var, at hann eisini skuldi fara úr formanssessinum í Vágatunlinum, tá hann alment lat upp. Klæmint Weihe viðgongur, at hann umhugsar at leggja frá sær.

– Tankin er ikki fremmandur, og eg havi bíðið um eitt prát við Bjarna Djurholm landsstýrismann um málið, men eg havi ikki endaliga tikið avgerðina. Eg kundi hugsað mær at fingið Vágatunnilin heilt lidnan fyrst, og har eru nakrir snøklar eftir enn. Innanhýsis í SEV er ongin trupulleiki, havi eg skilt, sigur Klæmint Weihe.

Kontantur prísur

Á degnum, tá Vágatunnilin lat upp, hevði hann bara tað besta at bera øllum og takkaði í eystur og vestur. Hann takkaði Landsverkfrøðinginum, politikarum, arbeiðstakarum og ikki minst stjóranum fyri Vágatunnilin, Dávid Reinert Hansen, sum hann segði hava gjørt eitt stórarbeiði fyri at fáa alt at glíða so smidliga.

Teir báðir komu í eitt satt ódnarveður, tá teir kunngjørdu prísirnar fyri at koyra ígjøgnum Vágatunnilin. Fólk hildu, at 250 krónur fyri báðar vegir var alt ov høgt sett, og seinni boygdi nevndin seg eftir hart trýst frá almenningi og politikarum.

– Vit høvdu ikki roknað við so kontantari reaktión. Nýggj tøl fyri, hvussu nógv ferðast um sundið, góvu okkum høvi til at endurskoða prísirnar, og nýggju prísirnir hava fingið nógv betri móttøku. So mugu vit vóna, at fólk fara at gera sítt til at vísa, at tølini fara at halda, sigur Klæmint Weihe.

Hann kann bara staðfesta, at stórur áhugi er fyri nógv umrødda kubbanum, sum gevur stóran avsláttur. Serliga teir við 40 túrum ganga sum heitt breyð.

Væl nøgdur

Klæmint Weihe er sjálvur ættaður úr Vágunum, og nú tunnilin er latin upp, minnist hann aftur á gamlar dagar, tá hann koyrdi eftir tí smala vegnum oman á Fútaklett. Hann minnist manga baldruta ferð til Havnar, og tá hjálpsomu ferjumenninir turkaðu spýggjuna upp.

– Tað er alt søga. Tað, sum fyrr tók eina heilan dag, tekur nú 40 minuttir, og tað gevur stórar møguleikar mentanarliga, vinnuliga og sosialt. Persónliga gleði eg meg til at vitja oftari aftur á røturnar, sigur Klæmint Weihe.

Hann heldur seg og øll onnur, sum hava stríðst fyri verkætlanini, hava alla orsøk er vera errin.

– Vit vórðu liðug væl áðrenn tíðina, og tað er sjáldan upplivað í Føroyum. Pengarnir passaðu eisini rættiliga væl, so vit hava góðar grundir at vera nøgd, sigur Klæmint Weihe.



Klæmint Weihe er væl nøgdur við arbeiðið, sum hann hevur gjørt í Vágatunlinum, hóast ákoyringarnar hava verið nógvar
Mynd: Jens K. Vang

Klæmint takkar fyri seg

Væl nøgdur stjóri

– Tað hevur verið ein framíhjárættur hjá mær at hava havt møguleikan fyri at standa fyri arbeiðinum við tunnlinum, sigur ein væl nøgdur Dávid Reinert Hansen, stjóri fyri P/F Vágatunnilin, nú málið er rokkið

FAST SAMBAND
Jón Brian Hvidtfeldt

Tað var ein væl nøgdur stjóri fyri P/F Vágatunnilin, ið seinnapartin týsdagin kundi eygleiða stóru mannamúgvuna, ið var komin saman at hátíðarhalda stórhendingina, tá undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund varð tikin í nýtslu.

– Hetta hevur verið ein framíhjárættur hjá mær at hava havt møguleikan at standa á odda fyri hesum stórarbeiði, sigur Dávid Reinert Hansen. Hansara leiklutur undir almenna hátíðarhaldinum týsdagin var avmarkaðaur til at bjóða fólki vælkomin, og annars, saman við nevndarformanninum í P/F Vágatunnilin, at halda í, tá Bjarni Djurholm við grindaknívi skar snórin, ið alment lat tunnilin upp fyri almennari ferðslu.

Eftir at P/F Vágatunnilin varð stovnað á ársins stytsta degi fyri skjótt fýra árum síðan, varð Dávid Reinert Hansen settur sum fyribilsstjóri í felagnum 1. mars 1999. 13 mánaðir seinni varð hann settur í fast starv í felagnum. Hann hevur sostatt staðið á odda fyri arbeiðinum at gera undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, frá byrjan til enda.

– Mín fremsta uppgáva hevur verið at samskipa arbeiðið – at fáa »timingina« at passa, sigur Dávid Reinert Hansen. At talan hevur verið um stórarbeiðið er lítið at taka seg aftur í, og sjálvt stjórin hevur trupult við at meta um, hvussu nógv fólk hava tikið lut í arbeiðinum, so ella so.

– Tá fleiri ymisk feløg hava tikið lut í arbeiðinum, eins og ymsu partarnir av arbeiðinum hava verið tætt bundnir hvør at øðrum, so hevur tað alla tíðina verið týdningarmikið at tryggja, at ymsu partarnir hava verið klárir, tá teir skulu, so arbeiðið ongantíð hevur steðgað upp, greiðir Dávid Reinert Hansen frá.

Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum

Skjótari enn tíðarætlanin

Upprunaliga hevði P/F Vágatunnilin mett, at undirsjóvartunnilin skuldi vera liðugur á sumri 2003. Tí var tað ein stór løta, tá nevndin í summar boðaði frá, at tunnilin kundi takast í nýtslu 26. november í ár.

– Aftaná ber til at siga, at tað var óheppið, at dagurin 26. november ikki helt kortini. Í summar var rætt at seta henda dato á, men sum kunnugt máttu vit seinni staðfesta, at hetta fór ikki at halda. Men samanumtikið mugu vit fegnast um, at vit kundu vera frammanfyri upprunaligu tíðarætlanina, sigur Dávid Reinert Hansen.

Stjórin greiðir frá, at tey frá fyrsta degi høvdu lagt uppfyri møguligum seinkingum, men at arbeiðið gekk betur enn væntað, eins og forðingarnar vóru færri.

– Eisini hava allir partar gjørt sítt besta fyri at fáa arbeiðið liðugt so skjótt sum gjørligt, leggur Dávid Reinert Hansen afturat.

Nógvar royndir

Tá Dávid Reinert Hansen nú hyggur aftur á arbeiðið við at gera undirsjóvartunnilin, er hann sum heild væl nøgdur við gongdina.

– Meðan arbeiðið hevur verið ígongd, hava vit gjørt fleiri eftirmetingar, m.a. tá tunnilin varð skotin ígjøgnum, og sjálvandi kundu onkrir smálutir verið gjørdir øðrvísi. Men samanumtikið høvdu vit ikki gjørt so nógv øðrvísi í dag, sigur Dávid Reinert Hansen, ið samtíðis vísir á, at felagið hevur fingið nógvar royndir av hesum arbeiði, ið er tað fyrsta av sínum slag í Føroyum. Hesar royndir ber sjálvandi til at nýta í samband við onnur arbeiði av hesum slag.

Leisturin við at lata eitt alment partafelag standa fyri arbeiði av hesum slag, samtíðis sum felagið skal virka leyst av politisku skipanini er nýggjur í Føroyum. Dávid Reinert Hansen sigur, at hóast felagið skal arbeiða óheft av politisku skipanini, so er tað natúrligt, at politikar vísa áhuga fyri arbeiðinum. Hann vísir samtíðis á, at stóra diskussión um, hvørt tað yvirhøvur var rætt at nýta henda leist, var longu í samband við anlegslógina, tvs. áðrenn P/F Vágatunnilin fór til arbeiðis, og tað hevur síðan lætt um hjá leiðslu og nevnd í felagnum.

Dávid Reinert Hansen sær tað heldur ikki sum nakran trupulleika, at fólk hava roynt at ávirka arbeiðið hjá almenna partafelagnum, m.a. í samband við tá prísurin fyri at nýta tunnilin skuldi ásetast.

Seinastu snøklar

Hóast tunnilin varð tikin í nýtslu 10. desember, so er framvegis okkurt smávegis arbeiði at gera, áðrenn tunnilin er heilt liðugur. Dávid Reinert Hansen væntar, at seinastu snøklarnir eru fingnir uppá plass, einaferð í januar mánað.

Eitt landnám fyri ungdómin

Vágatunnilin kann gerast eitt landnám fyri ungdómin.

Tað heldur Jónhild Jørgensen, forkvinna fyri felagskommunurnar í Vágum, sum eyðsæð fegnast stórliga um Vágatunnilin.

– Hetta kann føra til, at okkara ungu búgva longri heima. Tey hava ikki longri til útbúgvingarstøðini enn onnur norðan fyri Hórisgøtu, og vit sleppa undan brimi og bilrøðum um Oyrargjógv, sigur Jónhild.

Eins og nógv Vágafólk heldur hon, at tann 10. desember 2002 kanska er tann størsti dagurin í Vágum.

– Hetta er ein gleðisdagur, sum gevur vón eina bjarta framtíð. Tunnilin er ein mynd um, hvat vit kunnu vinna, um vit hava samstarvsevni og samstarvsvilja. Við hesum kunnu vit sum fólk vinna framá, sigur Jónhild Jørgensen, sum vónaði, at streymurin fer at ganga eins nógv vestur í Vágar sum eystureftir.

-ir

Kubbarnir útseldir

Avsláttarkort til Vágatunnilin verða ikki aftur at fáa fyrr enn eftir nýggjár. Bíleggingar verða avgreiddar, meðan hini mugu gjalda fullan prís

FAST SAMBAND
Jón Brian Hvidtfeldt

Ferðast tú ofta millum Vágar og Streymoynna, so kunnu vera nógvir pengar at spara við at keypa eitt avsláttarkort, ein kubba. Meðan vanligi kostnaðurin aftur og fram er 188 krónur, ber til at spara 38 krónur fyri túrin aftur og fram við einum 5-túra korti, og 76 krónur fyri túrin við 20-túra kort.

P/F Vágatunnilin hevði bílagt umleið 800 kubbar, men áhugin hevur verið so stórur, at avsláttarkortini eru útseld og vera ikki aftur at fáa fyrr enn eftir nýggjár, sigur Dávid Reinert Hansen, sum ásannar, at ov fáir kubbar eru bílagdir.

Á midnátt mikukvøldið verður byrjað at krevja gjald fyri at koyra undir Vestmannasund. Á skrivstovuni hjá P/F Vágatunnlinum eru umsøknirnar nústaðni avgreiddar, og tí vera kubbarnir helst ikki í postkassanum fyrr enn hósdagin. Og aftur onnur kunnu als ikki vænta at fáa nakran kubba fyribils, tí eingir eru eftir.

– Tey, sum longu nú hava biðið um eitt avsláttarkort frá okkum, kunnu koyra ígjøgnum við avsláttri, við ella uttan kubba, sigur Dávid Reinert Hansen. Hetta letur seg gera við at ein mynd verður tikin av øllum bilum, ið koyra ígjøgnum tunnilin, og hon verður samanborin við umsøknirnar um kubba. Síðan verður túrurin trektur av avsláttarkortinum, antin tað so er eitt 5-túra hald ella eitt 20-túra hald. Hetta letur seg gera, sambært stjóranum.

Hóast tey, ið hava bílagt kubbar, sostatt sleppa at koyra ígjøgnum við avsláttri, óansæð um tey fáa kubban ella ikki, so skulu hini, ið hava verið nakað sein á sjóvarfallinum og tí enn ikki hava bílagt sær ein kubba, fyribils rinda fullan prís.

– Tey, ið ikki longu nú hava biðið um avsláttarkort, noyðast næstu vikurnar at gjalda fullan prís, sigur Dávid Reinert Hansen, ið ásannar at hetta elvir til stóran meirkostnað fyri tey, ið nýta tunnilin ofta.